# HEILSANIR



**Góði Oddur**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum 9. febr.
**Heilsan kona tín**



**Góða Katrin**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 8 ára degnum.
**Mamma, babba, Gunnvá og Angela**



**Góði, fitti Oddur**
Hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum. Nú er kalt og kavi, so tað hevði verið gott við einum góðum bita.
**Frá okkum tær norðastu**



Hesi trý hava føðingardag 9. og 10. febr. og vit ynskja teimum hjartaliga tillukku.
**Frá familjuni oman fyri garðin**



Hesir báðir eru bestu vinir og hava tað altíð stuttligt saman. Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 26. januar og 17. febr.
**Heilsan… ja, gita hvør**



**Góða Katrin**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 8 ára degnum.
**Omma og abbi á Velbastaðvegnum**



**Góði Tórhallur!**
Hjartaliga tillukku við 20 ára føðingardegnum 10. febr. Alt tað besta verður ynskt tær.
**Karla og Eiler**



**Marianna Holm Jacobsen**
Góða, elskaða dóttir og systir. Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum 11. febr. Ein serlig heilsan frá babba. Ongantíð enn hevur babba verið í føðingardag hjá tær.
**Bestu heilsanir frá mammu og babba, William, Páll og Magnus**



**Góða mamma, vermamma og omma**
Hjartaliga tillukku við tí hálvrunda degnum. Alt tað besta í framtíðini. Takk fyri alt tú hevur verið fyri okkum. Kærastu heilsanir frá okkum øllum.
**Ann Tordis, Anna Katrin, Torfinn, Sverri og Guðrun**



**Góði Andrias!**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Vit elska teg.
**Heilsan mamman, pápin og Ásvald**



**Góða Marianna**
Tær verður ynskt hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum 11. febr. Nú fert tú skjótt í skúla. Hetta var ein stuttligur túrur við abba.
**Bestu heilsanir frá ommu og abba í Hvalba**



**Góði abbi!**
Hjartaliga tillukku við 75 ára føðingardegnum. Takk fyri mangar góðar løtur saman við tær.
**Heilsan abbabørnini**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum gleddu okkum á konfirmatiónsdegi mínum 6. oktober.
**Heilsan Trygvi Bech Árting**



**Góði pápi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 28 ára degnum. Vit elska teg.
**Heilsan Andrias og Ásvald**



## FØÐINGAR

28. jan. fingu Anni og Jógvan Thomsen, Hvalba, ein son. Hann var 52 cm. og vigaði 4090 gr.

31. jan. fingu Sólja Jacobsen og Rani Nattestad, Sumba, eina dóttur. Hon var 57 cm. og vigaði 4500 gr.

2. feb. fingu Frígerð Baldvinsson og Bárður Mortensen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 3650 gr.

2. feb. fingu Marie og Hjarvil Rasmussen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 3300 gr.

3. feb. fingu Durita R og Høgni Hansen, Oyndarfjørður, eina dóttur. Hon var 57 cm. og vigaði 4500 gr.

4. feb. fingu Meinhild og Bogi Kallsberg, Kolbeinagjógv, ein son, ið eitur Poul. Hann var 55 cm. og vigaði 4100 gr.

4. feb. fingu Turid Thomsen og Elias Hansen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 3900 gr.

4. feb. fingu Heidi Agnarsdóttir Thomsen og Jákup Thomsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 4200 gr.

5. feb. fingu Poulina og Edvard Mikkelsen, Søldarfjørður, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3500 gr.

5. feb. fingu Poula Ennistig og Andras Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. og vigaði 4400 gr.

## ANDLÁT

**23.01**
Elsa Vang, Essa, Svínoy, 85 ár
Marius Olsen, Klaksv., bús í Mikladali, 60 ár
Karl Trúgvi Jensen, Sandi, 77 ár

**25.01**
Súsanna Malena Ziska í Klaksvík, vanliga nevnd Sa-Malena, 87 ár

**26.01**
Hans Jacob Debes í Tórshavn, ættaður frá Gjógv, 62 ár

**27.01**
Katrina Jacobsen, fødd Lamhauge í Søldarfirði, 97 ár
Joen Frederik Djurhuus, Selatræ, 88 ár.
Jacob Pauli Sivertsen ættaður úr Funningi, búsitandi á Á Argjum, 88 ár

**28.01**
Lítli Jákup Egilson, sonur Anna-Mariu og Egil Olsen, í Runavík

**29.01**
Niels Christoffur Debes, í Tórshavn, 78 ár

**03.02**
Elsebeth Maria Joensen, Sandvík, 87 ár
Rakul Petersen, í Klaksvík, ættað av Húsum, 88 ár

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 8.2. Fuglafjørður, tlf. 44 40 38
Sunnudagin 9.2. Gøta, tlf. 44 10 86

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## PRÓGV

Annie Heinesen, Tórshavn, fekk tann 31.01. prógv sum cand.arch. á Kunstakademiets arkitektskole í Keypmannahavn.

## TILTØK

**Gudstænastur leygarkvøldið 8.februar**
*Sjóvar kirkja:* kl. 20.30 Ungdómsgudstænasta, Jógvan Fríðriksson

**5. sunnud. eftir trettanda**
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Haraldssund:* kl. 12, Niels Pauli Danielsen
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Elsa Funding
*Viðareiði:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Hvítanes:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Kirkjubøur:* kl. 12, Heri Joensen
*Fuglafjørður:* kl. 12, altarg., Uni Næs
*Gøta:* kl. 12, Martin R. Jacobsen
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Miðvágur:* kl. 12, David Johannesen
*Sørvágur:* kl. 12, deyvagudstænasta, altarg. Talvan gongur fyri deyvameinigheitina, Jónsvein Bech
*Norðskála:* kl. 12, barna- og familjugudstænasta, Sonja Tausen og Meinhard Bjartalíð
*Hvalvík:* kl. 12, M. Bæk
*Sandur:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Porkeri:* kl. 12, Ólavur Rasmussen

**Nardus samkoman, Tórshavn**
Eangel. fundir verða í Losjuni við Tinghúsvegin í Havn leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Talari verður Torkild Terkelsen.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið kl. 19.30.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Minnismáltíð Harrans – ímeðan er barnaansing, kl. 12 Sunnudagsskúli – samstundis er møti, har Øssur Berghamar talar. Evni: »Endurføddur – inn í Guds familju!«
Heimasíða www.hebron.fo

**Missiónsvikan á Argjum**
Sunnukvøldið kl. 20 Møti, Thomas Thomassen talar, sangur: Teir 4.
Mánakvøldið kl. 20 Møti, Harry Hansen, Nes talar, sangur: Manskórið í Meinigheitshúsinum.
Týskvøldið kl. 20 Møti, Inga Poulsen Dam, Miðvágur talar. Sangur: Meinigheitskórið.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti við luttøku frá Lívsins Orð.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin (møti teirra trúgvandi).
Heimasíða: www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómstiltak, sum er fyri øll. Regin Guttesen fer at tala um: Hvussu vinni eg á undirlutakenslunum.
Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla, familjumøti kl. 10.30 Jákup Jacobsen talar um: Hvat segði Jesus um Himmalin? og tilbiðjanarmøti kl. 12 Høgni Johannesen talar um: 1. Kor. – Væntandi sjálvdisiplin. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.
Týskvøldið kl. 19.30 Bøn- og bíbliutími úti á Fløtum. Janus, Hallur og Høgni tosa um: Forfylging av teimum kristnu.
Heimasíða. www.livdin.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møtirøð við evninum: Efesusbrævið kap. 4-6.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17 AWANA.
Kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Edith og Jónfinn Petersen, Leitisgøta, Argir
Fríggjakvøldið onki ATAP (Barnaklubbur).
Sunnudagin kl. 17 Møti og Sunnudagsskúli, Dánjal á Dul Jacobsen talar. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti og kl. 18 Møti, sangur, vitnisburður og tala.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótafundir.
Týsdagin kl. 17 og 20 Kórvenjing.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jógvan Steintún.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdagin kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni fyri 6. fl. og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Ólavur í Mittúni Christiansen.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Evangel. møti við breyðbróting.
Mánadagin kl. 20 húsmøti hjá Fríðbjørn og Kristu.
Telefonandaktin 424 741.

**Mansstevna, Sørvágur**
Mansstevna verður í Sørvági í døgunum 14.-16. feb. Møtir og seminar verða í Missiónshúsinum, meðan stevnuluttakararnir gista og eta á Hotel Vágum. Nærri fæst við at ringja til Harald Haraldsen, tlf. 217506/314027.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygardagin kl. 9.30 Morgunbreyð, Bíbliutími við Sverra Kass. Evni: »Berið byrðar hvør hjá øðrum«, kl. 16 Barnamøti, kl. 20 talar Olaf Magnusen, Streingakórið í KFUM og K syngur, kl. 22.30 Ungdómsløta, Christian Joensen talar, Lovsangs- og vitniløta.
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta við altarg., v/ Una Næs, kl. 14.30 Felags sunnudagsskúli, kl. 18 Pól Johannesen talar, Thaborkórið syngur. Innsavnan til Heimamissiónina, nátturði aftaná, kl. 21 Eftirmøti.

**Lívsins Orð**
Barnamøti verður í dag kl. 17.15. Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 11 Barnamøti, kl. 19 Evangel. møti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Evangeliskt møti**
verður í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum »Hæddini« í Runavík mikudagin 12. feb. kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin!
Vibeke Schaffalitzky og Inger S. Hildershavn.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Kæri himmalski faðir! Takk fyri barnaár, faðir og móður. Vælsignað foreldur og børn, og hvørt eitt heim og býlið. Amen

*»Sum ein faðir er mildur mót børnum sínum, so er harrin mildur mót teim, sum hann óttast«*

*Sálmur 103,13*

»Fátt er sum faðir – einki sum móðir«. Soleiðis verður tikið til, og máliskan er væl kendur sannleiki. Orðafellið ber positivan dám bæði mótvegis pápanum og mammuni. Torført er at koma í faðirs stað, og mamman er einans ein.

Hesar streingir slær skaldið Jákup Hansen í vakra kvøldsálmi sínum »Góða mamma eg vil sova«. Skaldið er í uppruna havnamaður, men búsettist í Syðrugøtu og fekk navnið »Havnar-Jákup«.

Sálmurin er yndisligur. Meðan hann verður sungin, rennur teim vaksnu í huga sælar barnadagar. Tað heimliga og fjálga. Og tá sálmurin verður sungin fyri teim smáu, legst friður yvir barnasinni. So mangan sovnaði barnið í tryggum føvningi, tá tað varð rurað í blund ella borið, meðan sálmurin varð sungin.

»Góða mamma, eg vil sova, // eygu míni møðast brátt; // Jesuspápi hevur lovað // meg at verja væl í nátt.«

Áhugavert er at varnast, at skaldið, sum so yndisliga kvøður um móður sína, fekk øðrvísi barnaár enn mong onnur. Mamman doyði, og hesin lítli pilturin gjørdist móðurloysingur. Úr hesum upphavi, fjálgum minnum og sakni, spratt ein hin vakrasta samanrenningin ímillum móðurkærleika og guðstrúgv. Mamman sum hin friðberandi jarðiska, ið legði forløg barnsins í alvaldshendur. Hendur, ið røkka, har sjálvt móðirhond má sleppa.

Náttin við síni skýmligu myrking, har skuggarnir hvørva og gerast eitt við valdandi myrkur. Svøvnur og møði, ið bera tað tilvitaða inn í dreymaland, har eyga hvílir í duldum medviti.

Tað er so nógv, kent og ókent. Tá at síggja mammuna og merkja hond hennara, tað heimliga og fjálga. Kenna friðin, har Jesuspápi er himmalski faðir okkara, eisini meðan vit ganga foldum á.

»Góða mamma, eg vil sova, // eygu míni møðast brátt; // Jesuspápi hevur lovað // meg at verja væl í nátt.

Tað er ein førningur verdur at geva í arv til nýggjar tíðir. Hin heimliga guðstrúgvin sungin í loynikamari. Guðs vernd og verja ber okkum sjálvt tá illa veit við. Tað er hitt stóra lyftið, at Guð vil vera við okkum allar dagar, alt til veraldar enda.

Amen.

**Jógvan Fríðriksson**